


Frá seinastu stevnu. Kaj Leo Johannessen, løgmaður, Jógvan Skorheim, borgarstjóri og Karl Birgir Isaksen, stjóri. Mynd Atlantic Fair

# Klaksvíkin – altjóða stevnustaður

Deil:

**Jan Müller**

17.02.2015 - 17:54

Oljan.fo

Millum tey mongu, sum síggja fram til stóra altjóða tiltakið Atlantic Fair í Klaksvík um knappar tríggjar mánaðir er borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu, Jógvan Skorheim.

“Atlantic Fair slóðar fyri vinnuni, sum hevur ein gyltan møguleika at finna samstavarspartar og fáa innlit í menning á einari altjóða maritimari stevnu á heimavølli. Hugskotið at halda eina slíka ráðstevnu var gott, og tað er sjón fyri søgn, nú vit øll hava

sæð, hvussu stevnan hevur ment seg og er blivin ein verulig altjóða stevna,” sigur borgarstjórin við oljuportalin.

Hann vísir á, at aftur í ár verða helvtin av framsýnarunum úr útlandinum, og tað kunnu vit fegnast um.

“Fyrireikararnir hava dugað serstakliga væl at skipa fyri og lagað Atlantic Fair til nýggjar tíðar og møguleikar. Eg kann sum borgarstjóri í Klaksvíkar kommunu eisini gleðast um, at stevnan verður hildin í fiskivinnuhøvuðsstaðnum, her møguleikarnir at halda eina slíka stevnu eru sera góðir. Tað er ein heiður fyri býin at verða vertur fyri Atlantic Fair aftur í 2015,” sigur Jógvan Skorheim, sum bjóðar føroyingum úr øllum landinum eins og útlendingum at vera vælkomin til stevnuna. Hon verður í døgunum frá 12. til 14. mai